# Finnbogi syrgir fyri trivnaðinum

**Týsdagin 6. september var móttøka hjá P/F Meinhardt Arge við Oyggjarvegin í Havn í sambandi við at stjórin, Finnbogi Arge, fylti 50 ár hendan dagin**

MÓTTØKA

*Myndir:*
*Jens K. Vang/Jan Müller*

Umleið 300 fólk møttu til eina annarleiðis móttøku í stóru verkstaðshøllini hjá P/F Meinhardt Arge, har maturin stóð á borðum og í viðførisrúmum á teimum ymisku bilunum. Eisini var lastin á einum pick-up brúkt til endamálið. Hotel Føroyar syrgdi fyri mati og tænastu.

Vegna starvsfólkin helt Jan Hentze, goymslumaður, ein talu fyri Finnboga. Hann segði m.a. at Finnbogi var orsøkin til, at starvsfólkini trívast so væl í fyritøkuni. Hetta ger hann m.a. við at skipa fyri útferðum ymsastaðni í landinum og syrgir fyri at tey fáa fríska frukt og at arbeiðsumhvørvið er gott og roykfrítt.

Starvsfólkini góvu Finnboga renniklæðir við tilhoyr í føðingardagsgávu. Hann rennur úti í Havnardali hvønn og dag, og sum tey høvdu skilt, vóru klæðini uppslitin.





*Pápi Finnboga, Meinhardt Arge, og Edmund Johannesen*



*Finnbogi og Osmund Justinussen, sum fylla sama dag*



*Systir Marisa og Finnbogi*



*Oyvindur Brimnes heilsar Finnboga*



*Finnbogi saman við konu og børnum, f.v.: døturnar Turid, Elisabeth og Maria, Finnbogi og Armgarð og yngsta dótturin, Lív*




*Fíni rækjumaturin var í eini pick-up last við ísi. Finnbogi saman við Halli H. Midjord og Virgar Enghamar frá Hotel Føroyum*